## DAGSINS MEINING

### Menningarhjálp til umrøðu

Í dag kemur uppskot løgmanns um føroyska menningarhjálp til aðalorðaskifti í løgtingi. Tað er í sjálvum sær sera positivt, at hetta mál nú kemur til viðgerðar á tingi. Vit hava á hesum staði fleiri ferðir víst á, at eitt ríkt land sum Føroyar eiga at lata menningarhjálp. Føroyar hava áður latið menningarhjálp, men hon hevur ikki verið skipað eftir ST endamálum. Sameindu Tjóðir hava sett so nevnd *Millenium Development Goals (MDG)*. Hesi mál skulu verða nádd í seinasta lagi 2015, sigur ST. Her hava Føroyar við at fara undir skipaða menningarhjálp eitt einastandandi høvi at markera seg positivt í altjóðasamfelagnum.

Í uppskotinum verður víst ikki minni enn sjey møguleikar fyri føroyskari menningarhjálp. Hesir fevna í stuttum um, at menningarhjálpin verður latin stovnum undir Sameindu Tjóðum til at nýta til ávís átøk í menningarlondum ella menningarhjálpin verður latin millumtjóða áhugafelagsskapum til at nýta til ávís átøk í menningarlondum. Víðari kann menningarhjálpin verður latin beinleiðis til staðbundnar verkætlanir og eitt nú gjøgnum føroyskar felagsskapir, ið virka á staðnum. Menningarhjálpin kann verða latin felagsátøkum hjá føroyskum vinnufeløgum og vinnufeløgum í ávísum oyggjamenningarlandi til tess at menna vinnulív tess. Ein annar møguleiki er, at menningarhjálpin verður latin felagsátøkum hjá føroysku fyrisitingini og fyrisitingini í ávísum oyggjamenningarlandi fyri at menna um fyrisiting og lóggávu tess. Endaliga verður víst á møguleikan, at bráðfeingisneyðhjálp verður latin við fíggjarnevndarskjali í hvørjum einstøkum føri, tá á stendur.

Allir hesir møguleikar eru skilagóðir, men tingið eigur at velja eitt ella tvey alternativ. Tað er givið, at møguleikin fyri bráfeingishjálp altíð eigur at vera tøkur. Hetta eiga tingmenn at kunna semjast um uttan víðari. Hvat hinum møguleikum viðvíkur, eigur at verða hugsað um, hvat slag av hjálp, ið vit hava førleikar til at veita. Í hesum høpi er møguleikin við, at føroyskir felagsskapir á staðnum skipa fyri áhugaverdur, og hetta er eisini galdandi fyri tað alternativ, ið snýr seg um at knýta menningarhjálp at føroyskum vinnulívi og føroyskari fyrisiting.

Tað hevur verið nevnt í bløðunum, at vit ikki skulu geva menningarhjálp, fyrr enn vit hava nøktað tørvin á íbúðum til breðkað fólk. Her eigur ikki at vera tala um antin ella men um "bæði og" - í so ríkum landi skal vera rúmd fyri at hjálpa úti so væl sum heima. Nú fær almenningurin so at hoyra, hvat tingmenn hava uppá hjarta. Tað er at vóna, at uppskotið fer at fáa góða móttøku, og at tingmenn í góðari semju finna fram til tey alternativ, ið gagna úti so væl sum heima.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Lyklaorðið er samstarv

**Kaj Leo Johannesen**



Føroyar og Danmark eiga at samstarva á trygdarpolitiska økinum - til gangs fyri báðar partar.

Løgtingið hevur í vikuni havt aðalorðaskifti um føroyskan trygdarpolitikk. Lagt verður upp til, at ein nýggj samtykt verður sett í verk, har álagt verður landsstýrinum at taka neyðug stig til tess at røkja trygdarpolitisku áhugamál Føroya.

Men uppskotið til samtyktar nevnir einki um, at gomlu hernaðarsamtyktirnar verða settar úr gildi, og tað er heldur ikki neyðugt, tí spurningurin er, um tær nakrantíð hava havt nakran veruligan týdning.

Í 1948 samtykti løgtingið heimastýrislógina, og gav harvið frá sær heimildirnar til avgerðarættin á trygdarpolitiska økinum. Men kortini hevur løgtingið seinni gjørt sínar egnu samtyktir, ið ikki samsvaraðu við heimastýrislógina.

Føroyar hava soleiðis sitið á tveimum hestum í langa tíð, hvar ið vit bæði vóru við og ímóti felags trygdarpolitikkinum hjá danska ríkinum.

Felagsskapir og eisini onkur politiskur flokkur hava í nógv ár mótmælt radarstøðini á Sornfelli, men nú tá okkurt bendir á, at støðin møguliga verður niðurløgd, mótmæla hesi somu eisini tí ætlanini.

Sambandsflokkurin hevur í Nýskipanaruppskotinum víst á, at ríkisstjórnin eigur formliga at umsita trygdarpolitikk Føroya, men hetta eigur kortini ikki at forða fyri, at Føroyar taka størri ábyrgd á økinum.

Tað er at fegnast um, at nýggja landsstýrið hevur tikið hetta álvarsmálið upp, soleiðis at vit fáa størri ávirkan, greiðar reglur og gott samstarv til gagns fyri báðar partar í einum vælvirkandi ríkisfelagsskapi.

# Áheitan

**Heidi Petersen**
*Løgtingskvinna*



Undirritaða vil við hesum heita á allar avvarðandi myndugleikar, lands, innlendismálaráðið, og kommunalar, Skálavíkar kommuna, eins og Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag, um sum skjótast at taka málið viðvíkjandi útlendsku arbeiðsmegini í Skálvík upp til viðgerðar.

Sum framgongur av grein í Dimmalætting 23. apríl 2004, er greitt, at støðan hjá hesum arbeiðsfólki er út av lagið vánalig, og kann hetta undir ongum umstøðum góðtakast fyri nøkur menniskju í Føroyum ár 2004. Treytirnar føroyska samfelagið bjóðar hesum fólkum at liva undir, eru í allar mátar ótolandi, bæði tí tær eru óvirðiligar fyri tey sum menniskju, men eisini tí hetta mest av øllum líkist einum lemjandi trælahaldi.

Tí er sera umráðandi at viðurskiftini hjá fremmandu arbeiðsfólkunum í Skálvík, alt fyri eitt verða viðgjørd og støða teirra lagað soleiðis, at tey fáa fyri menniskju virðiligar umstøður at liva og virka undir, og fyri føroyska samfelagið, tað viðferð og virðing sum sømir seg at vísa fremmandafólki. Hetta eigur at gerast á ein slíkan hátt, at vit sum tjóð kunnu vera errin av, hvussu okkara fremmandafólk vera viðfarin.

# Æ skriva førist er ondjin sæk – tæ kunn ødl, summ vilja

**Sofs æv Goilagære**
*oin loirvísjingor*

Negn hevor í soinasne vere skriva og tosa umm tæ føriska skriftmále, o floire vilja hæva tæ hammershaimbsko stævsedindjinna broitta til oitt moira læalitt skriftmál.

Ødl mál broidast vi tíjene o oia æt endeskoast frá tí til æra.

Spurningrin e bæra, kvønn veg si skullo færa - umm vi skullo tilæa skriftmále te tælemále idla øvutt. O naste spurningr vere so, kvør vande er í kvørjun, men tæ atle e mær ittje æt ummrøa.

Vi gomlo, í lærdo tæ føriska hammershaimbska skriftmále í badnaskúlanum æv lærarun, í vóro ernir æv æ vit otto oitt vækurt skriftmál, færa æ finna oitt moira tilæa-te-tælemále skriftmál ljódare enn tæ núverande, menn tæ er oin smag sæk, o vit ero jú vornir stirnir o attorhaldande á mongum øtjum, so tæ eru ittje vit, í oia æ ævdjera tæ, menn tær attinar, summ koma attaná okkun o skullo brúka måle í tí dagglia.

Tæ, summ ette mínare moining er æv støsta tídnindje, er æa tæ føriska måle veror varvoitt á onkran hott o ittje sindrast o kvørvor burtur í ørun málun, solois æ vi tumm nøkor ár ittje hæve okkara egna mál her á landi longr, sum onkor málfrøjingor stúre fire, tí tæ veror kvørtje frøje ella frøje í Førjun, tá vit hæva mist hendan okkara tídningamikla tjóvaridentitetin og færa de dømis at tosa o skriva dankst - do ve! Idla amerikanskt - jú nó! Bøtt lø kvessjon renn ókors uudd sørinli bi iff júr inglisj titsjørr kenn ekksept júr stævseding.

Tæ vær áloi solois e mointe da - menn sæma djer.

Tó, í mínare ver er mítt bigdamál oit tæ besta æ sjora oitt nítt førist skriftmál ettir, o hesun kann ondjin rattor føringur vera ósamdor vi mær í.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14.00

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Meginbókasavn og miðnámsskúli í Suðuroynni einaferð enn

**Jacob Vestergaard**



Hergeir Nielsen tók ikki ráð míni til eftirtektar. Í staðin fyri at leggja frá sær persónligt briksl, og taka tøk saman við hinum løgtingsumboðunum og øðrum góðum kreftum í Suðuroynni, heldur hann áfram við persónligum briksli, og vendur veruliga ranguna út í síni seinastu viðmerkingum.

Tað er sjálvtsagt sárt, tá eins persónligu politisku áhugamál verða avdúkað og detta niðurfyri, men tað er altíð rættast at taka í egnan barm, í staðin fyri at geva øðrum skyldina fyri egnan kleyvaskap.

Nei Hergeir Nielsen, kommunalt samstarv í Suðuroynni eigur at spretta millum kommunurnar í Suðuroynni, og ikki millum einstakar kommunur í Suðuroynni og ráðharrastovur í Havn.

Tað er sjálvtsagt ikki avgerandi, hvør kemur við hugskotinum ella ætlanini, men tað er altíð skilagott at spyrja teir, sum skulu verða við í ætlanini, hvat teir halda, áðrenn skjøtul verður settur á, í staðin fyri at koma við tí lidnu loysnini og so finna útav, at tað ein hevði arbeitt við, ikki hevði undirtøku millum teir, sum skuldu bera ætlanini uppi fíggjarliga.

Í staðin fyri at komi við teirri lidnu loysnini, átti fyrsta stigið at verið, at reist málið um meginbókasavn millum kommunurnar í Suðuroynni.

Í einum kommunalum samstarvi rinda kommunurnar vanliga íløgur og rakstur í felag eftir fólkatali og/ella inntøku. Í býtinum av útreiðslunum til ætlaða meginbókasavnið, sæst at málið hevði slagsíðu. Sjálvsagt skuldi Vágs kommuna ikki goldið meir enn hinar kommunurnar, um talan veruliga var um eitt kommunalt samstarv.

Um ætlanin veruliga var at gera framtøk fyri Suðuroynna, hevði landið átikið sær uppgávuna at gera meginbókasavn í Suðuroynni, og ikki lagt ætlanina á kommunurnar, ímóti teirra vilja.

Hergeir Nielsen blandar tingini saman. Jacob Vestergaard hevur ikki, hvørki sum formaður í Føroya Kommunufelag ella borgarstjóri í Sumbiar kommunu, arbeitt ímóti nakrari løgtingssamtykt um miðnámsskúla í Vági.

Tá lógaruppskotið um miðnámsskúla í Suðuroynni var fyrireikað, var Jacob Vestergaard landsstýrismaður. Hergeir Nielsen veit, ella átti at vita, at Jacob Vestergaard, sum landsstýrismaður, tók undir við uppskotinum um løgtingslóg um miðnámsskúla í Suðuroynni, tá tað var fyri á landsstýrisfundi, áðrenn tað var borið í Løgtingið.

Tá Mentamálaráðið fyrireikaði bókasavnslógina, gjørdi eg vart við, sum formaður í Føroya Kommunufelag, at lógin var í ansøgn til politikkin hjá landsstýrinum, og mælti til at broyta uppskotið, so landið átók sær uppgávuna at gera meginbókasøvn.

Sum borgarstjóri í Sumbiar kommunu møtti er á teimum fundum, eg var boðin til, har eg, mótsatt tí, sum Hergeir Nielsen førur fram, greitt segði frá mínari støðu til málið um ætlaða meginbókasavnið, og til nýtta framferðarháttin. Mín støða hevur alla tíðina verið væl kend.

Somuleiðis blandar Hergeir Nielsen støðu mína til ætlaða meginbókasavnið saman við byggingini av miðnámsskúlanum. Burtursæð frá viðgerðini í landsstýrinum, havi eg ikki luttikið í kjakinum um bygginga av miðnámsskúlanum í Suðuroynni.

Hergeir Nielsen skuldi tikið av, tá hann hevði møguleikan. Teir høvdu stórar ætlanir, sigur Hergeir Nielsen, hví framdu teir so ikki hesar ætlanir, tá teir høvdu møguleikan.

Tað er altíð lætt at hava stórar ætlanir, serliga tá aðrir skulu gjalda, men tað skal hegni til at fremja ætlaninar í verki. Vit kunnu í dag bert staðfesta, at teir høvdu ikki neyðuga hegnið til at fremja ætlanina við miðnámsskúlanum í Suðuroynni.

Aðrir hava nú tikið yvir, og fara at fremja ætlanina við miðnámsskúlanum, umframt aðrar ætlanir fyri Suðuroynna. Miðnámsskúlin verður avgjørt eitt aktiv fyri Suðuroynna og ungdómin í Suðuroynni.

Hergeir Nielsen tilleggur meginbókasavninum størri týdning enn tað hevur. Tað kemur sjálvtsagt ikki at ávirka nýtsluna av skúlanum, at ætlanin við meginbókasavninum er slept, tí miðnámsskúlin eigur at fáa sítt egna nýmótans bókasavn.

Nei, Hergeir Nielsen, Jacob Vestergaard sigur ikki ósatt. Á fyrsta fundinum eg var á, vóru tríggir av lærarunum, sum tóku orið, ímóti ætlanini at blandað ætlaða meginbókasavnið uppí byggingina av miðnámsskúlanum.

Tann eini lærarin, sum Hergeir Nielsen vísur á, hevur ikki broytt støðu, men hevur eins greiða støðu til málið í dag, sum tá málið kom fram.

Fundarfrágreiðingarnar frá lærararáðnum, sum Hergeir Nielsen kann biðja um at fáa innlit í, um tað hevur hansara áhuga, vísa greitt, at undirritaði ikki sigur ósatt.

Støðan hjá ávísum lærarum ella lærararáðnum hava tó ikki ávirka mína støðutakan, men vísur greitt, hvussu handfaringin av málinum hevur verið.

Eitt breitt kjak um miðnámsskúlan og meginbókasavnið millum suðuroyingar, brúkararnar av miðnámsskúlanum og ungdómin í Suðuroynni, áðrenn støða var tikin, hevði gagnað málinum betur, enn egin politisk áhugamál.

Jacob Vestergaard hevur ongantíð verið ímóti Vágs kommunu, ella nakrari aðrari kommunu í Suðuroynni. Tvørtur ímóti havi eg altíð tala fyri øktum kommunalum samstarvi í Suðuroynni.

Vit hava júst tikið stig til, saman við Hovs, Porkeris og Vágs kommunu, at betra munandi um tilbúgvingina í kommununum, við at keypa nýmótans brandbil, sum kemur til landið í næsta mánað.

Fyri meg hevur tað ongantíð havt nakran sum helst týdning hvar í Suðuroynni átøkini verða framd, sum tað vísur seg at hava fyri Hergeri Nielsen.

Tað er ikki spurningurin um at "kunna verða nakran fyriuttan", sum Hergeri Nielsen tekur til. Vit hava øll brúk fyri hvørjum øðrum, og kunnu ikki verða nakran borgara í Suðuroynni fyriuttan.

Tað er tí sera umráðandi, Hergeir Nielsen, at vit í Suðuroynni standa saman, sum ein maður, og í felag virka fyri at menna alla oynna, frá Sumba til Sandvík, og ikki stara okkum blind uppá ávís pláss í Suðuroynni.

Bert á tann hátt verða vit før fyri at menna okkum ájavnt við restina av landinum.

# Norðurlendsk konsertferð hjá kórinum Mpiri

TÍÐINDASKRIV



Útisetakórið Mpiri fer í summarhálvuni á konsertferð í Danmark, Týsklandi, Svøríki og Finnlandi. Fyrsta konsertin verður í Rundatorni mitt í Keypmannahavn mikukvøldið 28. apríl kl. 20.

Mpiri er eitt lítið føroyskt kamarkór í Keypmannahavn, ið er samansett av 13 útisetum í býnum. Tað hevur verið til í 6 ár og hevur hesi árini verið sera virkið. Skipaði millum annað fyri stóru Norðuratlantisku Kórstevnuni (www.nakf.dk) í 1999 fyri føroysk, íslendsk og grønlendsk útisetakór í Danmark. Í 2000 tók Sunleif Rasmussen við leiðsluni av kórinum, og Mpiri fór tað árið á konsertferð til Føroya. Árið eftir varð kórið boðið at luttaka á fyrstu Listastevnuni í Norðurlandahúsinum. Og í 2002 stóð ein umfatandi konsertferð á skránni, ið fevndi um londini: Danmark, Føroyar, Ísland og Svøríki.

Eftir at Sunleif Rasmussen í 2002 flutti aftur til Føroya, hevur kórið fingið nýggjan kórleiðara. Tað er danin Gorm Larsen, ið er úbúgvin kór- og orkesturleiðari á Kongaliga Danska Tónleikakonservatoriinum. Hann hevur eisini lært á Royal College of Music í London og lisið Tónleikavísund á Universitetinum í Århus.

**Frumframførslur**

Eyðkenni kórsins er, at tað serliga leggur seg eftir at syngja nýggjan føroyskan tónleik. Tí hevur kórið hesi árini bílagt og frumframført hópin av nýskrivaðum føroyskum tónleiki eftir millum onnur Kára Bæk, Tróndi Bogasyni og Paula í Sandagerði. Á konsertini í Rundatorni 28/04 verða nýggju verkini: 'Sonurin' eftir Tróndi Bogasyni til tekst hjá Tóroddi Poulsen og '4 element' hjá Kristiani Blak, ið verður sungið uttan orð, framførd á fyrsta sinni.

Temað á konsertferðini er júst gamla uppbýtingin av náttúruni í 4 grundelementini: Vatn, mold, luft og eld. Verkini eru øll bíløgd ella vald út eftir hesum evnunum. Td. syngur kórið 3 verk hjá Vagn Holmboe til náttúruyrkingar hjá Williami Heinesen og 3 hjá Sunleivi Rasmussen, ið eisini byggja á yrkingar, ið snúgva seg um náttúruna og tey fýra elementini. Umframt nýggja tónleikin eru eisini ensk verk úr renesansuni á skránni.

Lesið meira um kórið á heimasíðuni www.mpiri.org

**Konsertferðin**

28/04 kl. 20.00 í Rundatorni (Købmagergade 52A, 1150 København K)
07/05 kl. 18.30 á Norðatlansbryggjuni í sambandi við NAKF (www.nakf.dk)
11. & 12/06 fleiri framførslur í Suðurslesvig (Týsklandi)
September: Konsert í Lund (Svøríki)
Oktober: Konsertir í Porvoo, Turku og Uusikaupunki (Finnland)